## SEV

Á fundi í bygdaráðnum í 1946 var til viðgerðar stovnanin av interkommunalum ravmagnsfelagsskapi fyri Streymoy, Eysturoy og Vágar.

Samtykt varð at mæla til, at hesin felagsskapur varð stovnaður, og at tekna Eiðis kommunu sum lim.

Formaðurin, Símun E. Kristiansen, skuldi møta á stovnandi fundinum og hava fulltrú at atkvøða kommununar vegna.

Í januar 1947 valdi kommunustýrið Gunnar Andreasen til umboðsmann í SEV-nevndina.

## Nýggj vatnleiðing oman „av Keldum"

Gamla vatnleiðingin úr Breiðá var í fýratiárunum so illa farin, at hon nøktaði ikki vatntørvin á Eiði. Tey ovastu húsini í bygdini høvdu oftani einki vatn, og um veturin bar av, og tí var oftani neyðugt at fara eftir vatni Yviri í Gjógv í Eriksa keldu ella onkrum av teim niðastu húsunum, har tað enn lagraði í krananum.

Nýggja prestakonan, Nanna Brimnes, ið var donsk, kom til Føroya í 1947, tá Zacharias, maður hennara, gjørdist prestur á Eiði. Skjótt eftir, at hon var komin, fór hon í húsini á Eiði at fáa húsmøðurnar at skriva undir eina áheitan á kommunustýrið um at fáa eina nýggja vatnleiðing. Hetta gjørdi sítt til, at nýggja vatnleiðingin av Keldum gjørdist veruleiki.

## Heilsunevndin nýggjan formann

Eftir at hava sitið sum formaður í heilsunevndini síðani byrjanina í 1928, fór R.K. Rasmussen, lækni, frá sum formaður í 1945-46. Eftir hann gjørdist Óli Egilstrøð, listamálari, formaður.

## Nýggja kloakk

23. mai 1950 fekk heilsunevndin brævfrá Hans Doris Hansen, vanliga nevndur Hans í Andrasstovu, har hann biður nevndina um loyvi at leggja avlopsrennu frá rottanganum og eystur í Geilina.

Hetta skriv gjørdi, at heilsunevndin vendi sær til kommunustýrið við áheitan um at fáa eitt betri „kloakksystem" í bygdini.

Heilsunevndin sigur m.a. í brævi til kommunustýrið:

„Tá nú skjótt verður nóg mikið av vatni til hvørt hús, verða tað ivaleyst fleiri hús, sum fara at fáa sær tíðarhóskandi WC. Lækjan liggur sum ein opin renna og má tí leggjast undir lok og verður tá ein góð kloakk, sum nógvar avlopsrennur kunnu renna í."

Heilsunevndin sigur seg ikki kunna geva nakað loyvi at leggja rennu út í Lækjuna, sum støðan er, og biður tí sóknarstýrið um at fáa hetta gjørt sum skjótast.

## Læknaviðurskifti

Umboð fyri Sundalagskommunu, Gjáar

Ejde, d. 15' Januar 1952.

Jeg, der har været Kommunelæge i Ejde siden Juni 1920 og nu er 65 Aar gammel, opsiger herved min Stilling og rejser herfra d. 30' Juni d. A.

Idet jeg skriver disse Linier, føler jeg Trang til at takke nuværende og tidligere Forstanderskaber for de Kommuner, som i Fællesskab er mine foresatte, for de gode Arbejdsvilkaar, jeg har haft i de 32 Aar, jeg har boet her.

R. K. Rasmussen.

Til Forstanderskabet i Ejde.

Sent avrit til Gjáar, Funnings, Norðskála og Hálsoyrar 23/12.52

*R.K. Rasmussen var nógv avhildin sum menniskja og sum lækni tey 32 árini, hann virkaði í Eiðis læknadømi. Á hinari síðuni sæst uppsagnarbræv hansara.*



kommunu, Funnings kommunu, Haldórsvíkar kommunu og Eiðis kommunu høvdu fund á Eiði í 1952.

Mourits Olsen, kommunustýrisformaður á Eiði, greiddi frá royndunum at fáa nýggjan lækna eftir R.K. Rasmussen, sum skuldi fara frá 30. juni sama árið. Hann upplýsti, at danska læknafelagið av serstøkum orsøkum sýtti fyri at seta lýsingina eftir nýggjum

*Kend summarmynd fyri 40-50 árum síðani. Olaf í Garði og „Brúsi" heim av Torvstakki við hoyggi.*



lækna í læknablaðið, men at landslæknin hevði fingið Leif Dahl at røkja starvið fyribils. Leif Dahl varð settur í starvið 1. oktober 1952. Hann varð verandi í hesum starvi til 1. mai 1959.

Í millumbilinum til 1. mai 1960 røkti Marner Simonsen læknastarvið í Eiðis læknadømi.

1. mai 1960 tók Petur Reinert við sum lækni og sat í hesum starvi til 1. desember 1986. Meðan Petur sat í landsstýrinum 1975-1979, røkti Kaj Kalsberg læknastarvið. Petur Reinert andaðist ólavsøkuaftan 1991.

Síðani 1. desember 1986 hevur Magnus á Stongunum røkt kommunulæknastarvið í Eiðis læknadømi.

## Nýggjan skúla

16. oktober 1957 stendur at lesa í gerðabókini: „Kommunustýrið hevur samtykt at fara undir at byggja nýggjan skúla, og eru tekningar til skúlan góðkendar og studningur játtaður."

Samtykt varð at byggja skúlan á einum grundøki, ið er 70x80 metrar, og sum liggur í haga oman fyri bygdina, uppi í Kolli, „undir Kolshjøllum" av hagapartinum „Fyri Norðan Á."

Í 1963 samtykti kommunustýrið at ognartaka eitt øki aftrat, so at skúlaøkið kundi gerast størri. 13. juni 1963 samtykti kommunustýrið at taka við einum tilboði frá Hans Háfjall í Klaksvík um at byggja skúlan fyri kr. 479.000,-.

Í 1975 varð umsókn send landsstýrinum og skúlastjórnini um at byggja upp í skúlan. Kostnaðurin varð mettur til kr. 300.000,-.

## Loranstøðin

Árið 1959 verður loranstøð gjørd norðuri í Fløgunum. Nógv arbeiði stóðst av byggingini. Eisini fingu nógvir mans varandi arbeiði.

*Træbrúgvin um ánna suðuri í Nesinum.*

